# E - og tónleikurin



**Petur Pólsson, yrkjari og tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
- Nei, í grundini ikki.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
- Nei, tað geri eg ikki.

*Syngur tú undir brúsuni?*
- Tað veldst um brúsuna.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
- Sál, sinni og hjarta — við øðrum orðum: alt.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
- Umleið 500-600.

*Hvat er tín yndisfløga?*
- Í løtuni er tað The Flaming Lips við »Yoshimi Battles The Pink Robots«.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
- Shaggy.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
- Mr. Boombastic.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
- Greatest Love Song — simpelten.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
- Suspicious Minds.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
- Muse, Radiohead, Mercury Rev, U2, The Flaming Lips ella Enekk.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
- Eg vil helst ikki uppliva sunnumorgnar, men Sigur Rós er væl egnað. Ella Mogwai.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
- Gluntan-poppur.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
- Eminem við »Without Me« og Elvis vs. JXL »A Little Less Conversation«.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
- »Got a lot of Livin' to do« við Elvis Presley.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
— »Daylight« og »Skirvin Flá« við Clickhaze.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
- »Death is not the End« hjá Bob Dylan.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
- Mercury Rev í Keypmannahavn 27. augsut 2002, Muse á Midtfyns Festivalinum 2002 og Pearl Jam á Roskilde Festivalinum í 2000. Jú, tú sært rætt, Pearl Jam konsertin var eisini ein tann vemmiligasta konsertin, eg havi verið á, men Pearl Jam hevur eitt serligt pláss í mínum hjarta.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
- Bob Dylan, Bono, Elvis, Eddie Vedder, Van Morrison, Thom Yorke, Matthew Bellamy úr Muse, Tom Waits, Engelbert Humperdinck (spyrja hann um navnið er seriøst) og David Bowie. Listin er langur.

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Árni Gregersen, Bornholm, argr@tv2bornholm.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Vár og krígshóttan

Hitamálarin hevur kropið sær upp um frostmarkið — sólin sær, og í jørðini kennist lív.

Veturin hevur verið drúgvur her í Eystrasalti við nógvum frosti, men veðrið hevur verið gott. Faktisk er hetta einasti veturin vit ikki hava havt illveður í teir skjótt níggju vetrarnar eg havi búleikst á Bornholm.

Men tað hevur verið kalt leingi. Ikki so kalt, sum tað onkuntúð hevur verið, men í tríggjar mánaðir hevur tað verið millum minus tríggjar og minus átta stig. Kuldin ger, at veðurlagið er meira stabilt. Í seks vikur hevur verið turt — sjáldsamt hjá einum føroyingi um veturin.

Sjálvt um veðrið hevur verið einastandandi, so hevur tað verið vetur. Myrkt leingi — og kalt. Veturin er harður við sálina, men hann kann brúkast til mangt annað. Millum annað til at lesa.

Havi brúkt nógv kvøld til at lesa. Mær dámar serliga væl at lesa svenskar krimisøgur. Sviar hava tradition við Sjøwal og Walhlø. Í seinastuni havi eg lisið 10 bøkur um løgreglumannin Wallander. Hann arbeiðir í Ystad — svenski býurin, sum ferjunrnar frá Bornholm sigla til.

Wallander er óførur, men at síggja til er hann ein vanligur løgreglumaður, sum vit eisini kenna teir á Bornholm og í Føroyum. Alt fyrigongur seg í vanligum tempo, og valdsgerðir koma sjálvan fyri. Nei, hann hugsar seg um og ger so tað sum gerast skal. Harumframt livir hann eitt gerandislív, sum ikki er øðrvísi enn hjá okkum flestu.

Henning Mankell eitur rithøvundurin, sum hevur skrivað hesar bøkurnar. Summar bøkur eru gjørdar til film, men stuttligari er nú at lesa.

Veturin er eisini egnaður til at hoyra tónleik, hyggja í sjónvarp og royna at gerast eittt sindur klókari og meira vitandi.

Stóru spurningarnir í tilveruni kunnu vendast, og júst í vetur hevur verið eitt serstakt høvi. Krígshóttanin fær ein at hugsa um, hvat hendir í lívi okkara og serliga hvat hendir rundan um okkum. Hvørja ávirkan hava vit sjálvi og hvussu nógv vilja vit sjálvi avgera?

Demokratiski formurin vit hava valt okkum, hevur sum oftast havt við sær, at vit fjórða hvørt ár velja onkran at umboða okkum. Hesi umboð taka so mangan tær stóru avgerðirnar okkara vegna. Vit góvu teimum "mandat" til júst tað.

Hendan reglan er enn galdandi, men spurningurin er hvussu leingi. Broytingar í samskiftinum og nýggjar metodur at meta um, hvat almenningurin heldur um ávís mál, gera, at tey sum skulu taka støðu fáa eitt heilt annað grundarlag at gera tað á.

Nú ganga ikki longur fýra ár til fólksins dómur fellur. Meiningarkanningar eru í dag so neyvar, at tey sum umboða okkum, beinanvegin fáa at vita um vit halda tey hava gjørt rætt ella skeivt.

Eg veit væl, at hetta ikki heilt er viðurkent í Føroyum enn. Vit vita, at summir politikarar — umboð fyri okkum — helst ikki vilja vita av veljarakanningum, um tær ikki ganga teirra veg. Vit vita eisini at summi heldur vilja bíða fýra ár, og so fáa at vita hvat veljarin helt.

Men soleiðis er tað ikki longur — alt gongur skjótt, og vit vanligu borgarar senda eisini boðini skjótari nú enn fyrr.

Krígshóttanin móti Irak er stóra málið, sum vit taka støðu til í hesum døgum. Tað er ikki lætt. Fyri og ímóti kunnu uppá mangar mátar viga eins nógv, men kríggj má tó altíð verða seinsta loysn.

Sjálvur ivist eg ikki í, at vit fáa eitt kríggj nú — við ella uttan viðmæli frá ST. Amerikumenn hava sent herfólk til krígsøkið, og tað verður torført hjá Bush, forseta, at taka herfólki heimaftur uttan at tey hava verið í kríggi.

Vónandi gongur tað tó ikki sum eg vænti. Várið er á veg her á okkara leiður — Grækarismessa er farin afturum og fyrstu tjøldrini komin.

Alt tekin um ljósari tíðir.

**ítróttur**

Nr. 52 • leygardagur • 15. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ítróttarsendingin á SVF byrjar 24.mars

**Allur ítróttur fær innivist í sendingini, men serliga verður varpað ljós á fótbóltin**

ÍTRÓTTARSENDING
*Páll Holm Johannesen*



*Teir báðir vertirnir á 3-2, Tórur Mikkelsen og Høgni í Jákupsstovu, eru úti og gera tilfarð til ítróttarsendingina, sum verður víst fyrstu ferð 24. mars*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sjónvarp Føroya fer nú aftur undir at gera eina ítróttarsending. Sjónvarpið hevur fingið nógvar ábreiðslur fyri at gera alt ov lítið við ítróttin, men nú fáa ítróttaráhugaðir føroyingar eina sending um vikuna at síggja fram til.

Sjónvarp Føroya hevur áður roynt at havt ítróttarsendingar á skránni, men tær eru allar dotnar niðurfyri. Síðan Tórun Ellingsgaard hevði ítróttarsendingar miðskeiðis í 90 árunum, hevur ítrótturin ikki havt innivist í eini vikusending í SVF. Nú verður so aftur gjørd ein roynd við eini ítróttarsending í sjónvarpinum. Ítróttarsendingin verður fyri fyrstu ferð at síggja mánakvøldið tann 24.mars.

Heitið á sendingini verður stutt og greitt 3-2, og hon skal ætlandi vera hvørt mánakvøld eftir Breddan. Ítróttarsendingin verður um hálvan tíma til longdar.

Annar av høvuðsmonnunum aftanfyri sendingina, Høgni í Jákupsstovu sigur, at úrslitið 3-2 dekkar yvir flestar ítróttargreinir, og tí mettu teir, at heitið á sendingini lýsti væl, hvat innihaldið fer at vera í sendingini.

Tað verða teir báðir Høgni í Jákupsstovu og Tórur Mikkelsen, sum fara at standa fyri sendingini. Umframt teir báðar, verða fólk leysliga knýtt at sendingini. Talan er bæði um journalistar og myndafólk. Høgni í Jákupsstovu ásannar, at SVF ikki hevur somu møguleikar sum útlendsku rásirnar hava, og tí er skipanin við at fáa fólk uttanifrá fingin í lag.

### Nógvur fótbóltur

Høgni í Jákupsstovu sigur, at 3-2 ætlar at vísa ítrótt í sínari breiðari merking. Tað verður pláss fyri øllum ítróttargreinum, men serliga verður tað fótbólturin, sum sjónvarpið fer at leggja seg eftir.

Ætlanin er at taka um endan á hondbóltinum, og tá landskappingini í fótbólti fer á rull aftur verður Sjónvarp Føroya eisini við. 3-2 fer ikki at kappast við bløðini og Útvarp Føroya um tey feskastu tíðindini, tí teir fjølmiðlar hava nógv betri møguleikar at lýsa aktuellar søgur, enn vit, sigur Høgni í Jákupsstovu.

Sjónvarpið fer heldur at leggja seg eftir at hava góðar myndir frá ymiskum ítróttarhendingum. Ætlanin er at hava spennandi innsløg við øðrum vinklum, enn vit vanliga síggja í hinum fjølmiðlunum. Hyggjarin skal vænta sær spennandi søgur um áskoðarar, dómarar, leikarar og onnur øðrvísi evni, verður sagt úr sjónvarpinum.

Ein fastur táttur í 3-2 verður ein gestur í sjónvarpsstovuni, sum sleppur at siga sína hugsan. Umframt fasta gestin, so er ætlanin at hava málini frá øllum landskappingardystum í 1.deild. Tríggir av teimum fimm dystunum verður journalistur á staðnum, sum skal viðgera dystirnar og gera samrøður við aktuellar persónar.

Hóast nógvur fótbóltur verður á skránni á ítróttarsendingini, so verður ikki talan um nakra fótbóltssending burturav. Tá stevnurnar byrja í juni mánað, ætlar sjónvarpið at vera á staðnum, tí rættiliga stórur áhugi er fyri kappróðri. Ætlanin er eisini at koma út á smáplássini, so sendingini ikki einans viðger evni, sum liggja miðstaðarøkinum nær

Í fyrstu atløgu verður 3-2 á skránni til miðskeiðis í oktober. Tá verður ein eftirmeting gjørd av sendingunum, og avgjørt um tað skal haldast fram.

Fyri ítróttaráhugaði má tað kennast fjálgt, at SVF aftur fer undir ítróttarsendingar, og eftir er bert at vóna, at ítróttarsendingin verður ein fastur táttur á skránni hjá SVF í framtíðini.

# ÍF hevur bestu kortini

**Í kappingini hjá monnum eru framvegis silvurkrónurnar at kappast um.**

FLOGBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Bæði hjá kvinnum og monnum verður seinasta umfar í flogbóltskappingini leikt leygardagin. Hjá monnum er longu greitt at ÍF er greipuvinnari, meðan í kappingini hjá kvinnum verður onki avgjørt fyrr enn seinni í dag.

### IF best fyri

ÍF-kvinnurnar fáa vitjan av botnliðnum KÍF, og tað er snøgt sagt ein dystur sum oddaliðið eigur at vinna. Kvinnurnar hjá ÍF hava aldrin áður vunnið meistaradeildina, men seinni í dag hava tær ein gyltan møguleika at vinna fyrsta meistaraheitið felagsins.

Í Klaksvík fær Mjølnir vitjan av Fleyr. Klaksvíkskvinnur hava framvegis møguleikan at vinna meistaraheitið, men so krevst at ÍF snávar ímóti KÍF.

Mjølnir hevur ikki vunnið meistaraheitið, síðan 2000, og í Klaksvík mugu tey skjótt fara at ótolnast, nær næsta meistaraheitið kemur aftur til Klaksvíkar.

Greipuvinnarnir í kvinnudeildini í fjør av Tvøroyri møta í seinasta umfarinum Drátti í høllini í Trongisvági. Tvørgentur hava havt eitt misjavnt kappingarár samanborið við í fjør. Tað er longu greitt, at tær enda á triðja plássi, men størsti glottin í ár má vera sigurin í steypakappingini ímóti ÍF.

### Silvurkrónurnar at berjast um

Seinasta vikuskiftið gjørdist greitt, at ongin tekur ÍFí meistaradeildini hjá monnum í ár. Framvegis er kappingin um silvur og bronsumerkini. Mjølnir liggur í løtuni á triðja plássi, men við sigri á Fleyr í KÍ-høllini enda teir á øðrum plássi, meðan sørvingar mugu taka til takkar við bronsuni

Greipuvinnararnir úr Fuglafirði enda á heimavølli ímóti Fram. Dysturin hevur ongan týdning fyri hvørgan av liðunum, tí tað er greitt, at Fram endar á fjórða plássi. Fuglfirðingar vilja tó enda kappingarárið væl, so lagið verður enn betri, tá teir fáa handað gullheiðursmerkini eftir dystin.